Guðrun og Stig Rossen syngja saman

Í kvøld fara Guðrun S. Jacobsen og kendi danski sangarin Stig Rossen á pall saman á Langelandsfstivalinum. Talan er um tiltak til frama fyri Raffens Børnefond

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Tað gongur væl hjá Guðruni Sólju Jacobsen, sum ferðast millum Føroyar og Danmark í heilum, tí hon hevur úr at gera har niðri.

Í kvøld klokkan 19 skal Guðrun á pall á stóra palli á Langelandsfestivalinum. Har er tá tiltak við fleiri kendum nøvnum, ið fara á pall til frama fyri Raffens Børnefond.

Umframt Guðruna eru Stig Rossen og Nanna og James Sampson (fyrrverandi vinnari av Stjerne for en aften) og fleiri onnur.

Guðrun skal syngja lagið There you'll Be og saman við einum av størstu nøvnunum í donsku undirhaldsvinnuni, Stig Rossen, syngur hon Lille Frøken Himmelblå.

Guðrun og Stig Rossen standa eisini ovast á lepanum fyri tiltakið.

Tiltakið hevur tema úr filmsheiminum og t.d. Nana er kend fyri lagið Buster úr filminum Busters Verden. Hon skal eisini syngja filmslagið hjá Kim Larsen, Tarzan Mama Mia.

Tað eru kendu films og sjónvarpsmenninir Peter Mygind og Hans Otto Bisgaard, ið siga frá og knýta tiltakið saman.

At syngja saman við einum av størstu stjørnunum innan danskt undirhald er ikki øllum unt, so tað gongst Guðruni væl, kann staðfestast. Tann 11. august kemur fløgan hjá Guðruni, so enn eru nakrar vikur at bíða.

Í kvøld klokkan 19 fer Guðrun á pall saman við Stig Rossen, ið helst telist millum dansku sangararnar, sum hava mesta viðráki

ELDRADAGUR
- til eldri fólk -

Eldradagurin í ár verður hildin leygardagin tann 9. august í bygdarhúsinum í Miðvági.

Byrjað verður við morgunmati kl. 9.00 til 10.00. Døgurði til kl. 12.00 til 13.30. Kaffi kl. 16.00

Fjølbroytt skrá

Kostnaður kr. 250,- fyri hvønn luttakara.
Goldið verður við inngongdina.
Lutaseðlar verða seldir.

Luttøka kann fráboðast á hesum telefonum:
33 20 53 - 33 31 53 - 33 26 60 - 44 13 96

Luttøka má fráboðast í seinasta lagi 26. juli har ein eisini kann fáa nærri at vita um skránna.

Landsfelag Pensjónistanna

Sosialurin 341800

Galvaniseraðir Variant viðfestisvognar

- Eykalutir, útgerð, søla og tænasta
- Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Sosialurin 341800

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Massaga!

Nýggj massagumiðstøð latin upp.

Í okkara nýggja "Relax Room" í J. C Svabosgøtu, bjóða vit nú tað nýggjasta nýggja innan massagustólar.

Velji sjálvi ímillum :
Aksla-, ryggja-, lenda- og leggjamassagu
Ella massagu til allan kroppin

Kom og royn teir !
Týsdagin - mikudagin og Hósdagin bjóða vit øllum **ókeypis** massagu.

Opið er hvønn gerandisdag kl. 12 - 17, og eftir nærri avtalu.

Prísur 13 min. massagu 1 ferð	kr. 50,00
10 túrakort	kr. 390,00

"Massagen giver indre ro og ydre velvære."

Stolen går virkelig i dybden, og giver rigtig massage. Den er god til af finde de ømme punkter, og løsne for spændte muskler. Behandlingen virker både terapeutisk og afstressende. Efter en lang arbejdsdag som fyrioterapeut, med handicappede børn og unge bruger Eliza selv massagestolen til at forebygge rygproblemer og smerter. Hun anbefaler at den bruges hveranden dag for at forebygge rygproblemer og smerter.

Eliza Jacobsen, Vittarp, Fysioterapeut

Sosialurin 341800

Ergo & Hjálpartól - eitt lívsan hjálpartól -
J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 • Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo